Tinganes hevur vi› n‡ggju st‡risskipanini at kalla fingi › einaveldi í Føroyum. Ta› er landsst‡ri vi› sínum embætisverki, i› hevur alt lóggávuinitiativ

Mynd: Jens Kr. Vang

Tingi› uttan lóggávuvald

***Bakgrund:** Embætisfólkini hava tiki› ræ›i› í Føroyum. Í parlamentarisku skipan okkara er løgtingi› lóggávuvaldi› me›an landsst‡ri› er útinnandi valdi›. Kortini er ta› fyrisitingin hjá landsst‡rinum, i› vegna landsst‡ri › ger nógv tey flestu lógaruppskotini, sum løgtingi› sí›ani bert skal avgrei›a. Hetta eru tingmenn ónøgdir vi›, og grundlógarnevndin setir spurnartekin vi› máli›*

JOHN JOHANNESSEN

Einasti ney›ugi førleikin hjá einum tingmanni er, at hann dugir at skyna á grøna og rey›a knøttinum, tá hann skal atkvø›a fyri ella ímóti lógaruppskotunum, i› koma úr landsst‡rinum.

Solei›is seg›i núverandi landsst‡risma›urin í undirvísingar- og mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, í drúgvari samrø›u vi› Sosialin, me›an hann enn var tingma›ur.

Ta›, sum Tórbjørn Jacobsen í samrø›uni sipa›i til var, at tingfólk í veruleikanum bert sita í tinginum og avgrei›a lógaruppskot, sum landsst‡ri› leggur fyri tingi›.

Nú er Tórbjørn Jacobsen landsst‡risma›ur og hevur eina umsiting, sum smí›ar lógaruppskot fyri hann at leggja fyri tingi› til samtyktar.

Men meiningin um vantandi lóggávumyndugleikan hjá løgtinginum er ikki burtur, hóast Tórbjørn Jacobsen nú situr hinumegin bor›i› og umbo›ar útinnandi valdi›.

Hans Pauli Strøm, tingma›ur, er limur í einum arbei›sbólki í grundlógarnevndini, sum vi›ger føroyska stjórnarvaldi›. Í hesum arbei›sbólki hevur hann, saman vi› ø›rum tingmonnum og serkønum, sett fram spurningin, um løgtingi› vi› at samtykkja n‡ggju st‡risskipanina hevur lati› frá sær veruliga lóggávumyndugleikan og gjørt seg sjálvt so at siga arbei›sleyst.

Serkunnleikin vantar

Heilt arbei›sleyst er løgtingi› kortini ikki. Tí ta› skal hvørja tingsetu, afturat mongu uppskotunum frá landsumsitingini, eisini vi›gera fleiri uppskot, i› andstø›utingfólk leggja fram.

Men trupulleikin vi› uppskotunum frá andstø›uni er í flestu førum, at tey ikki eru nóg væl gjøgnumarbeidd. Orsøkin til hetta er, at andstø›utinglimirnir og tinglimir annars ikki hava tann serkunnleikan tøkan, sum landsst‡rismenninir hava í umsitingini.

Tískil eru uppskotini frá andstø›uni oftast veikari enn uppskotini frá landsst‡rinum, samstundis sum ta› koma fá uppskot frá andstø›uni orska› av, at hon ikki hevur orku til at fyrireika uppskotini.

Alt hetta ger, at ta› er ein rár hending, at eitt andstø›uuppskot ver›ur samtykt í løgtinginum.

N‡ggja st‡risskipanarlógin tók útinnandi valdi› frá løgtinginum. Men enn vantar at taka lóggevandi valdi› frá landsst‡rinum og serliga fyrisitingini

Men hetta heldur løgma›ur einki løgi vera í. At flestu uppskotini, i› ver›a samtykt í tinginum koma frá landsst‡rinum er ikki ør›vísi enn í ø›rum londum, sigur hann.

– Máli› eftir eitt val er jú, at ta› skal vera politikkurin hjá samgonguni, i› ver›ur førdur út í lívi›, ger løgma›ur greitt.

Kortini ásannar løgma›ur, at ta› ikki er rætt, at alt lóggávuinitiativ skal koma frá útinnandi valdinum. Og hann er grei›ur um, at trupulleikin hjá løgtinginum er vantandi serkunnleiki.

Tí heldur Anfinn Kallsberg, at ta› møguliga hev›i loyst seg at sett nakrar løgfrø›ingar á løgtingsskrivstovuni, sum kundu hjálpt tingmonnum vi› at smí›a lógaruppskot. Men samstundis heldur løgma›ur, at hetta kann seta samgognuna í eina tvístø›u. (Samgongan hevur jú skriva› undir eitt samgonguskjal, sum landsst‡ri› vi› síni fyristing skal halda seg til, og tí er ta› óheppi, at løgtingi› vi› einari a›rari fyrisiting fer at mótarbei›a hesum.)

Formansskapurin í løgtinginum hevur tiki› nøkur stig til at betra um møguleikarnar hjá tingfólkum. Løgfrø›ingar eru í ávísan mun til taks á løgtingsskrivstovuni, og tingbólkarnir hava fingi› pening til at seta hvør sín skrivara.

Men tingfólk halda framvegis ikki, at tey hava nóg gó›ar umstø›ur til at røkja uppgávuna sum lóggávuvald, hóast løgma›ur vísir á, at ta› ongantí› á›ur eru samtykt so nógv andstø›uuppskot, sum seinastu árini.

Ov lítla tí›

Ein annar trupulleiki, sum plágar tingfólk er, at nógv lógaruppskot, sum koma úr landsst‡rinum, koma fyri í tinginum so stutt á›renn ney›ugt er at seta tey í gildi, at løgtingi› ikki fær møguleika at vi›gera tey nóg væl.

– Vit tigmenn sita í dag í løgtinginum og blástempla

slík uppskot, sum vóru vit bert ein avgrei›sluskrivstova, sigur Hans Pauli Strøm, løgtingsma›ur fyri Javna›arflokkin.

Hetta heldur løgma›ur ikki vera rætt. Tí ta› skal sambært tingskipanini vanliga taka hálvanannan mána› at avgrei›a eitt lógaruppskot í løgtininum.

– Eg skilji ikki, at løgtingi› kann finna uppá at atkvø›a fyri uppskotum, sum ta› ikki hevur sett seg inn í, sigur Anfinn Kallsberg, løgma›ur.

Í hesum sambandi hevur Anfinn Kallsberg hug at finnast at sjálvari skipanini í teimum ymisku flokkunum á tingi. Tí vanlig mannagongd hjá sitandi landsst‡ri er, at øll lógaruppskot skulu sendast út til flokkarnar til kunningar, á›renn tey ver›a endaliga avgreidd í landsst‡rinum og løgd fyri tingi›. Og løgma›ur vissar um, at solei›is ver›ur fari› fram.

– Trupulleikin er bert tann, at vit hoyra aldri naka› aftur frá flokkunum, sigur løgma›ur.

Hendan mannagongdin hjá landsst‡rinum er lík mannagongdini í Danmark, har rá›harrarnir altí› taka framsøgufólkini hjá øllum flokkunum fyri ávísa máli› vi› í vi›ger›ina, á›renn lógaruppskoti› fer fyri Fólkatingi›. Vi› hesum tryggjar rá›harrin sær, at meiriluti ver›ur fyri uppskotinum í Fólkatinginum, hóast andstø›an í Danmark ofta er størri enn samgongan.

Vanvir›a tingi›

Men júst bo›ini um, at nú skuldu øll lógaruppskot frá lansst‡rinum sendast út til flokkarnar til vi›ger›ar, á›renn tey fara í tingi›, hava skapt øsing millum politikarar.

Tingfólk í samgonguni eru farin so langt sum at siga, at løgma›ur vi› hesi mannagongd leggur upp til einaræ›i, og at hann vanvir›ir tingi›.

– Er samgongan li›ug at vi›gera øll lógaruppskot á›renn tey koma fyri tingi›, ver›ur andstø›an sett til viks, og hetta er at vanvir›a tingi›, seg›i Heni O. Heinesen, sum tá var forma›ur Tjó›veldisfloksins, vi› Sosialin 6. januar í ár.

Ta›, sum ru›uleikin tá snúi seg um, var pensjónsmáli› hjá Helenu Dam á Neystabø. Ta› var› lagt fyri tingi› 23. november 1999 og í skundi samtykt 22. desember 1999, tí lógin skuldi koma í gildi á›renn 1. januar ár 2000. Hetta var ein tí›, har nógv uppskot vóru til vi›ger›ar í løgtinginum, millum teirra fíggjarlógaruppskoti› fyri ár 2000.

Uppskoti› var ikki fullfíggja›, og skapti ta› beinanvegin stórar trupulleikar í skattingini av pensjónistum.

Løgtingi› er vi› n‡ggju st‡risskipanarlógini vor›i› ein avgrei›slustova hjá landsst‡rinum, sum bert skal syrgja fyri at samtykkja uppskotini, landsst‡ri› kemur vi›

Men tingmenn søgdu orsøkina til, at teir tóku undir vi› uppskotinum, vera, at máli› kom alt ov seint í tingi› og var› tískil skrumbla› ígjøgnum.

Á tí›indafundi longu 4. januar seg›i løgma›ur orsøkina vera, at tingfók ikki høvdu sett seg nóg væl inn í uppskoti›, á›renn ta› kom til vi›ger›ar, og tískil ikki vóru før fyri at mæla til broytingar. Uppskoti› var› nevniliga sent flokkunum til ummælis, á›renn ta› kom fyri tingi›.

Løgtingsforma›urin seg›i vi› Sosialin 6. Januar, at orsøkin til ru›ulleikan var, at tingi› ikki hev›i fingi› nóg gó›a tí› at vi›gera máli›.



Jóannes Hansen, samfelagsfrø›ingur, er forma›ur í bólkinum, sum í grundlógarnevndini vi›ger stjórnarvaldi›. Hesin bólkurin hevur vi›gjørt vantandi lóggávumyndugleikan hjá løgtinginum

Mynd: Álvur Haraldsen

Kommunuvallógin tvey ár ov sein

Uppskoti› um at broyta lógina um kommunuval, sum í dag er til tri›ju vi›ger› í tinginum, er enn eitt dømi um eitt lógaruppskot, sum í skundi er skrumbla› gjøgnum tingi› uttan ávirkan frá tingfólki.

Løgma›ur ásannar enntá í vi›merkingunum til uppskoti›, at ta› skuldi veri› komi› longu fyri tveimum árum sí›ani, tá Kommunuáliti› í september 1998 mælti til hetta.

Men uppskoti› var› ikki lagt fyri tingi› fyrr enn 19. september í ár umlei› 750 dagar ov seint.

Sí›ani ganga átta dagar frá fyrstu vi›ger›, sum er 21. september, til nevndin skrivar eitt álit, sum er eina lítla A4 sí›u til longdar.

Skuldi nakar tingma›ur fingi› hug at granska uppskoti› nærri og møguliga fingi› framt somu hoyringar og fingi› somu rá›geving, sum landsst‡ri›, hev›i hann ikki meira enn átta dagar at gera hetta í.

Rættarnevndin, sum vi›gjørdi máli›, hev›i bert stundir at tosa vi› tríggar mans, sum eru at finna í eini ringrás á 500 metrar frá løgtingsskrivstovni.

Nevndin hevur fund vi› Leiv Hansen, b‡rá›sformann í Havn, Jens Marius Poulsen, b‡rá›sskrivara í Havn, og Anfinn Kallsberg, løgmann. Tó tosar forma›urin í nevndini vi› umbo› fyri Kommunufelagi› og Kommunusamskipan Føroya gjøgnum telefonina.

Tingi› fær ikki møguleika at senda uppskoti› til vi›ger›ar hjá óheftum serfrø›ingum, rættarnevndin fær eingi innlegg frá teimum, sum skulu liva undir lógini og t‡dningarmikla máli› ver›ur ikki vi›gjørt vi› almennum or›askifti.

Oman á ta› heila bi›ur landsst‡ri› um at fáa lógina broytta, eftir at uppskoti› er lagt fram. Løgma›ur heitir á rættarnevndina at skoyta upp í lógaruppskoti›, at fyrsta kommunuvali› sambært hesi lógini fer fram t‡sdagin 21. november 2000. Lógin sigur annars, at kommunuval skal fara fram annan t‡sdag í november.

Orsøkin til at løgma›ur ba› um at fáa hetta skoytt upp í lógina var, at lógin kom so miki› seint fyri tingi›, at ikki fór at bera til at fáa hana l‡sta á lógligan hátt á›renn annan t‡sdag í november í ár.

Bert avgrei›slustova

Landsst‡ri› hevur í hesum føri enn einafer› tr‡st eitt lógaruppskot gjøgnum tingi›. Og tingi› hevur tr‡st á grøna knøttin og avgreitt lógina.

Landsst‡ri› hevur alt lógarinitiativi›, og tingnevndir sleppa ikki at vi›gera tørvin á lógum. Men bert mál, sum eru løgd fyri tingi›.

Tingnevndir kunnu ikki skipa eina hoyring um tørvin á til dømis n‡ggjari fer›slulóg.

Tingnevndir ella tingfólk kunnu ikki bi›ja ein jurist skriva eitt uppskot um lóg og fáa hann at finna fram vi›komandi tilfar, gera tilmæli, skriva vi›merkingar, vi›gera politisku stø›utakanina og so fram vegis.

Tí kunnu tingfólk, føroya fólk og óheft serkøn spyrja seg sjálv, um tey ikki bert eru eitt óney›ugt avgrei›sluli› í parlamentarisku skipanini.